og rutinan er nøkunlunda í lagi. Hetta hendir fyrst og fremst í spæli, til dømis í rolluspæli um 6 ára aldur. Tí hevur tað alt at siga, at 6 ára gamla barnið fær árið millum 6 og 7 at mennast málsliga í saman við yngri børnum, sigur Asta í Toft.

### Skúlin er ein hóttan

Í hesum sambandi fílist hon hvassliga á karmarnar í føroyska fólkaskúlanum.

- Í løtuni eru karmarnir ein beinleiðis hóttan móti menningini hjá børnum, vísir hon á. Og hon tekur fram dømi um skúlatímarnir á 45 minuttir, turrgeldu spæliøkini uttandura og so hetta við at sita still og arbeiða við støði í einari bók – øll í senn.

- Børn hava ikki gott av at sita inni á reyvini, staðfestir hon.

Her forklárar hon, hvat tey hava upplivað í Miðstovninum í Gundadali eftir at børnini í 1. flokki hava fingið fleiri tímar í skúlanum seinastu árini.

- Børnini eru nógvar ferðir troyttari, tá tey koma til okkara aftan á skúlatíð. Tey orka ikki at spæla og tað er ikki hugsingur um at fara túr við teimum, til dømis í mølina ella í plantaguna, sigur hon.

Eisini upplivað tey, at børnini eru í ringari lag, og at fjúsið er nógv styttri enn fyrr. Tey eru meira frustrerað, konflikturnar eru fleiri og tey krevja nógv meira av teimum vaksnu.

- Hetta sigur mær somikið sum, at tað tænir ongum endamáli, at geva børnunum meira av tí, sum fólkaskúlin hevur at bjóða. Tey skulu hava eitt betri, meiri fjølbroytt og livandi tilboð, tí børn skulu vera glað og nøgd – eisini aftan á skúlatíð!



*Asta í Toft, leiðari fyri Miðstovnin í Gundadali*

## Børn skulu vera glað og nøgd – eisini aftan á skúlatíð!

### Umsorgan í hæddina

Sum pedagogur sær Asta trivnaðin og natúrligu menningina hjá børnunum sum sítt arbeiðsøki. Í sambandi við tey 6 ára gomlu, er tað serliga umsorganarparturin, sum hon ber ótta fyri í verandi skúlaskipan.

Í orðinum umsorgan liggur hetta við at lurta, lofta, hava tíð, at troysta, at skilja, at vilja barnið, at tora tað og at vera til staðar í nú'inum saman við barninum. Ikki minst í dag, har foreldrini í alt størri mun eru burtur frá børnunum, sum so verða latin upp í hendurnar á profesionellum pedagogur og lærarum.

- Sum samfelag hava vit skyldu til at taka hetta í størsta álvara, tí ein stór ábyrgd liggur á okkara herðum. So skúlatilboðið kann ikki bara vera traditionell innlæring, men eitt tilboð til tað heila menniskja, sigur Asta í Toft.

- Børn hava brúk fyri vaksnum, sum tey kunnu hava álit á, kunnu rokna við og rokna út!

### Hungra eftir at læra

Men kortini viðgongur Asta í Toft, at børnini læra eitthvørt í føroyska skúlanum, eisini hóast hesin sami skúlin lá næstniðast í Pisa kanningini herfyri.

- Hetta prógvar bert tað, sum vit vita: At drívmegin at læra er íbygd í børnum. Driftin og hugurin til lærdóm er so stórur, at tey læra næstan óansæð, hvat vit bjóða teimum, tí tey finna altíð upp á okkurt spæl, tá tey kunnu, sigur Asta.

Og hon tekur hattin av fyri lærarunum, sum virka innan skúlans gátt.

- Bæði lærarar og næmingar klára seg hóast alt. Men tað er bara upp á tross!

Hon ímyndar sær, hvussu fantastisk úrslit kundu spurst burtur úr, um skipanin og karmarnir vóru meira nútíðarhóskandi.

- Men viðhvørt hevði eg eisini ynskt, at lærararnir vendu nøsini 180 stig, og hugsaðu meira um, hvussu til ber at laga skúlatilboðið betri til barnið, sigur Asta í Toft.

### Lærarar valdast

Hon heldur, at børnini kundu lært nógvar ferðir meira enn vit ímynda okkum í dag, tí fortreytirnar kundu verið so nógv betri gagnnýttar. Her hugsar hon um nýggjastu tøknina, náttúruna, globaliseraðu heimsmyndina, miðlarnar og allar dygdirnar vit hava at bjóða her á landið.

- Tað eru sjálvandi eisini góðir lærarar. Men tað kann ikki vera rætt, at vit sum foreldur og samfelag skulu góðtaka, at skúlagongdin hjá barninum veldst um, hvørjar lærarar barnið fær, sigur Asta Í Toft, sum heldur, at sjálv skipanin má vera soleiðis, at øll børn fáa allarbesta skúlatilboðið.

- Í løtuni lúgva vit fyri børnunum, tá vit billa teimum inn, at tað verður fantastiska spennandi at fara í skúla. Tí tað passar ikki!

*rigmor@sosialurin.fo*

# Øll mugu lyfta í felag

**Lærarar og pedagogar mugu uppfinna eitt skúlatilboð, sum hóskar til nútíðarsamfelagið**

Asta í Toft, leiðari fyri Miðstovnin í Gundadali, mælir staðiliga frá, at senda 6 ára gomlu børnini í skúla. Hon hevur sum so onki ímóti forskúla, men hon heldur, at vit eiga at bíða í nøkur ár, til vit hava snikkað tað rætta tilboðið til tey 6 ára gomlu saman.

Ikki minst í dag, har foreldrini í alt størri mun eru burtur frá børnunum, sum so verða latin upp í hendurnar á profesionellum pedagogur og lærarum.

- Sum samfelag hava vit skyldu til at taka hetta í størsta álvara, so skúlatilboðið ikki bara verðu traditionell innlæring, men eisini eitt tilboð til tað heila menniskja, sigur Asta í Toft.

Hon heldur, tað vera umráðandi at fáa pedagogarnar við, so innskúlingin verður eitt gott upplivilsi fyri allar partar.

Eitt innskúlingstilboð, sum fevnir um børn úr 5 upp í 11 ár – ella úr barnagarði og nøkur ár inn í skúlan, har pedagogar og lærarar eru saman um børnini.

- Traditionella skúlatilboð tekur hvørki atlit til tey 6 ella 7 ára gomlu. Tí skulu pedagogar fylgja við og leiða børnini yvir um ta djúpu gjønna, sum tíverri er millum stovn og skúla í løtuni, sigur Asta í Toft.

Í skipanini ímyndar hon sær, at lærararnir taka sær av sjálvari undirvísingini, meðan pedagogarnir eru har til tann menniskjaliga partin. At vera tann vaksni, sum hevur tíð at lurta, práta við, at troysta og at leiðbeina børnunum í sínamillum samskiftinum eisini

# Samskipað innskúling

**INNSKÚLING** Landsstýriskvinnan í Mentamálum ímyndar sær, at vit samskipa innskúlingina við at byggja á tað besta frá barnagarðssiðvenjunum - og frá skúlasiðvenjunum

Rigmor Dam

Fyrr í mánaðinum var ráðstevna um skúlabyrjan, sum Mentamálaráðið skipaði fyri.

Endamálið við ráðstevnuni var at varpa ljós á, hvønn týdning ein vælskipað skúlabyrjan hevur fyri læring, menning og trivnað hjá børnum. Kortini snúði stórur partur av tiltakinum seg um fyrimunir og vansar við at senda børn í skúla sum 6 ára gomul.

Til høvið hevði landsstýriskvinnan bjóðað umboðum úr hinum norðurlondunum at greiða frá um teirra skipan. Umboðini talaðu øll fyri at senda børnini skúla sum 6 ára gomul – ongin var boðin við at tala ímóti. Tað vóru ikki vísundaligar grundgevingar fyri at senda børnini í skúla sum 6 ára gomul, men argumentið var, at børnini hungra eftir at læra og at flestu londini í OECD eru farin yvir til at senda børnini í skúla sum 6 ára gomul.

### Børn skulu spæla

Í røðuni, sum landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, helt á ráðstevnuni um skúlabyrjan staðfesti hon eisini, at verandi skúlaskipan hevur tørv á at verða umskipað, so hon í størri mun hóskar til natúruna hjá barninum.

- Leikur og læra eru ikki andsagnir, men treyta hvørja aðra – kanska alt lívið. Børnini hava rætt til bæði leik og læru, sama um tey eru eitt ár, ella um tey eru tíggju ár, segði hon, og vísti á, at tað eigur at bera til, at laga eina skipan til, sum tekur støðið í barninum – eisini tí 6 ára gamla.

### Børn eru ikki íløt

Men tað krevur vitan, gransking og orðaskifti at broyta dagstovna- og skúlaskipanina.

- Sjálv haldi eg tað vera rætt at lækka skúlaaldurin niður í 6 ár, skilt á tann hátt, at forskúli skal gerast eitt tilboð fyri til øll børn, segði landsstýriskvinnan, sum eisini hevði gjørt sær nakrar tankar um, hvussu forskúlin skal verða skipaður. Og hvussu vit tryggja okkum neyvt samstarv – kanska enntá samskipan - millum dagstovnaøkið, frítíðarskúlin og fólkaskúlin.

- Hvussu tyggja vit okkum, at báðar skipanirnar fata barnið sum eitt tilfeingi, sum eitt menniskja við egnum førleikum, og ikki bara sum eitt ílat, sum vit skulu stoyta førleikar niður í. Vit eiga sjálvandi at byggja á tað besta frá barnagarðssiðvenjunum - og frá skúlasiðvenjunum, segði landsstýriskvinnan millum annað í røðuni.

### Nógvir fótonglar

Og hon remsaði eina rúgvu av forðinum, ella fótonglum, sum vit mugu fáa bilbukt við, áðrenn vit kunnu


*Helena Dam á Neystabø*

bjóða 6 ára gomlu børnunum í skúla: Ov smáar kommunur, ógreitt býti millum land og kommunur, stirvin lóggáva, stirvið tíma- og lærugreinabýti, tveir ymiskir starvsbólkar, tvey ymisk fakfeløg, serstovnaøkið og, at vit skulu ikki vera bangin fyri broytingum.

Endamálið við ráðstevnuni var at byrja eitt orðaskiftið, sum skal enda við einari semju um, hvussu brúgvin millum dagstovn og skúla skal byggjast, og at brúk er fyri bæði lærarum og námsfrøðingum og kanska øðrum starvsfólkabólkum við – bæði á dagstovnaøkinum, í frítíðarskúlanum, í fólkaskúlanum og innan sernámsfrøðiliga økið. Vit mega ikki gloyma, at málið skal loysast úr sjónarhorni barnsins, segði landsstýriskvinnan.

*rigmor@sosialurin.fo*